## FØROYA BANKA TÍÐINDI

FØROYA BANKI

*Virðisbrævamarknaðurin:*

# Avgerandi rentufundir í USA og Evropa í vikuni



Lánsbrævarenturnar hava verið óstøðugar seinastu vikuna, men samanumtikið eru tað bert tær stuttu renturnar, ið eru hækkaðar í vikuni. Hetta er vanligt, tá ið marknaðurin roknar við, at leiðandi rentan verður hækkað av tjóðbankanum.

Í dag byrjar rentufundurin hjá amerikanska tjóðbankanum, og frammanundan roknar marknaðurin við, at rentan verður hækkað eitt kvart prosent í morgin.

Orsøkin er vøksturin í amerikanska BTÙ, sum framhaldandi er omanfyri 5%. Ynski hjá tjóðbankanum er ein vøkstur á 3%, og so leingi vøksturin er hægri, kunnu vit rokna við rentuhækkingum.

Vandin er fyri, at rentuhækkingin verður á hálvt prosent. Grundgevingin er, at seinastu lyklatølini hava víst á, at búskapurin er við at yvirhita eins og gjaldsjavnahallið alsamt økist. Tjóðbankastjórin trýr tó enn uppá framleiðsluvøkstur og eina javna niðurgongd í búskapinum.

Okkara meting er, at teir hækka rentuna 3 ferðir á kvart prosent í fyrru hálvári av 2000.

Hósdagin hevur Evropeiski tjóðbankin rentufund, og her eru marknaðarluttakararnir meira ivasamur, um ein rentuhækking kemur longu nú. Orsøkin er, at sjálvt um kjarnuinflatiónin hækkar, er hon enn ongin hóttan. Tó verður roknað við, at inflatiónin verður hægri enn 2,0% í februar ella mars fyri síðani at falla javnt aftur. Málið hjá tjóðbankanum er, at inflatiónin ikki verður hægri enn 2,0%.

Hinvegin er evran komin undir stórt trýst av amerikanska dollaranum. Veika evran skapar grundarlag fyri størri útflutningi, tí evropeiskar vørur gerast bíligari í t.d. USA, men vandin er, at tann vaksandi eftirspurningurin uttanlands skapar innflutta inflatión.

Evropeiski tjóðbankin hevur higartil bert nýtt inflatiónstøl og gjaldumfarið sum grundgeving fyri rentuásetingini, og út frá hesum meta vit ikki, at rentan verður hækkað hósdagin, men heldur í mars, tá ið tjóðbankin hevur fingið úrslitið fyri teir stóru lønarsáttmálarnar í Evropa.

Gongdin hesa seinastu vikuna hevur havt við sær, at 10-ára danska statslánsbrævið - 6% st. lån 2009 - kl. 12 í dag kostaði 100,98 móti 100,77 fyri viku síðan. 2-ára statslánsbrævið - 4% Stgb 2001 - kostaði 99,61 móti 99,53 fyri viku síðan. Tað føroyska lánsbrævið - 4,125% FRL 2000 - kostaði 99,60, sum svarar til eina effektiva rentu á 4,60%.

*Gjaldoyramarknaðurin:*

## Amerikanski dollarin sett met

Seinasta hósdag varð BTÚ í USA almannakunngjørt, og var hon hægri enn væntað. Marknaðurin tulkaði hetta sum enn eitt prógv um, at vøkstur framvegis er í amerikanska búskapinum. Fyri at fyribyrgja at inflatiónin veksur, verður væntað, at amerikanski tjóðbankin hækkar rentuna við 1/4 % á fundinum í morgin. Væntaða rentuhækkingin og seinastu lyklatølini úr Amerika, sum hava víst, at vøksturin framhaldandi er stórur, gera tað meiri áhugavert at gera íløgur í Amerika samanborið við Evropa. Hetta hevur styrkt munandi um dollaran, sum hósdagin í undafarnu viku varð sterkari enn evran, og síðani er hækkaður enn meiri. Amerikanski dollarin hevur ikki bara sett met mótvegis evruni, men um samanborið verður við D-markin, er amerikanski dollarin nú tað sterkasta, hann hevur verið í 10? ár. Amerikanski dollarin kundi í dag á middegi keypast fyri 767,91 móti 741,17 fyri viku síðani.

## Enska pundið methøgt

Enski búskapurin er eins og amerikanski búskapurin í vøkstri. At evran er nógv viknað seinastu vikuna hjálpir eisini væl til at styrkja pundið. Væntað verður eisini, at enski tjóðbankin hækkar rentuna 1/4% á fundinum næsta hósdag. Um enska pundið verður samanborið við størstu samhandilslondini hjá Onglandi sæst, at enska pundið nú er tað sterkasta, tað hevur verið í nærum 14 ár. Enska pundið kundi í dag á middegi keypast fyri 1238,37 móti 1222,78 fyri viku síðani.

# Tjóðveldismenn spæla fríspæl

Jan Müller

Tað eydnaðist ikki Sjálvstýrisflokkinum at fáa eitt endaligt svar frá Tjóðveldisflokkinum á samgongufundinum mánadagin. Flokkurin hevði biðið um at fáa málið um oljuútgerðarhavnina við á samgongufundin og vildi vita, um tingmenn Tjóðveldisflokksins fóru at atkvøða fyri einum broytingaruppskoti hjá Javnaðarflokkinum um, at alt oljuvirksemi skal vera í Suðuroynni.

Jákup Sverre Kass, tingmaður (SJFL) sigur, at maðurin, sum teir ætlaðu at seta spurningin, Hergeir Nielsen, rýmdi av fundinum, áðrenn hetta málið kom fyri. Formaðurin í flokkinum, Heine O Heinesen var heldur ikki á fundinum. Tískil svaraði Høgni Hoydal spurninginum, men sambart Jákup Sverra Kass varð hetta einki svar.

-Eg og fleiri við mær halda, at tað kann ikki vera rætt, at Tjóðveldisflokkurin skal sleppa at spæla fríspæl í so mongum málum. Hetta er hent fleiri ferðir í seinastuni og er málið um olju



# Útjaðarabólkur standa sína roynd

*-Orðaskiftið í dag um eitt nú oljuútgerðarhavnina er fyrsta høvi hjá teimum, sum siga seg hugsa um útjaðaran, at vísa í verki, hvussu farið eigur at vera til verka í hesum landi, tá ein nýggj vinna tekur seg upp sigur javnaðartingmaðurin Henrik Old undan 2. viðgerð í dag av málinum um 1. útbjóðing til oljuleiting.*

Jan Müller

Er tað upp til javnaðartingmannin í Suðuroynni, Henrik Old, so verður tingfundurin seinnapartin mikudagin at taka drúgva tíð. Málið um 1. útbjóðing til oljuleiting kemur til 2. viðgerð, og ein orsøk til at javnaðartingmaðurin metir hesa viðgerðina at taka nógva tíð er tann, at málið snýr seg í veruleikanum eisini um støðuna hjá útjaðararanum í framtíðini.

Henrik Old sigur, at her sleppa nógvir at standa sína roynd, ikki minst teir, ið vanliga tosa um útjaðaran. Eitt nú Tjóðveldisflokkurin. -Eg síggi, at býráðsformaðurin á Tvøroyri heldur tað vera náttúrligt, at Hergeir Nielsen atkvøður fyri uppskoti Javnaðarfloksins, men tað er ikki nokk bara við honum. Um Tjóðveldisflokkurin meinar nakað við sínum útjaðarapolitikki, so eiga fleiri enn Hergeir Nielsen at atkvøða fyri uppskotinum.

Henrik Old heldur eisini, at útjaðarabólkurin sleppur at standa sína roynd. -Hetta er í veruleikanum fyrsta málið, har útjaðarabólkurin sleppur at vísa, hvat dugur er í honum. Sjálvandi rokni eg við, at hann allur atkvøður fyri okkara uppskoti, men ger hann ikki tað, so eri eg ivasamur um lagnu hansara. Í hvussu er er grundarlagið tá tunt undir honum. Henrik Old sigur, at aftanfyri útjaðaran standa bara 12 atkvøður, so tað er ikki nóg mikið til at fáa málið ígjøgnum. Sjálvur vísir hann aftur einum uppskoti, sum verður broytt til útjaðaran ístaðin fyri at oyramerkja hetta til Suðuroynna. Tá hevur tú tikið argumentið burt fyri at leggja hetta virksemi í einum ávísum stað.

Henrik Old heldur eisini, at nettup hetta málið er eitt gott høvi at vísa á nýggjar leiðir í føroyskum politikki, har landsplanlegging verður brúkt í praksis. -At fara inn í eina nýggja øld og kunna siga, at vit løgdu fyri við at reka skilagóðan vinnu- og útjaðarapolitikk vildi verið eitt stórt pluss fyri okkum øll, sum liva í hesum landi.

-Hetta verður eitt stórt orðaskifti. Um nakar meinar nakað við tað hann sigur, at man skal stuðla uppundir útjaðaran, so er hetta tann givni møguleikin, tí hetta er nakað, sum ikki er farið í gongd sigur tingmaðurin.

Henrik Old vísir eisini til, hvat ein støða, har einki verður avgjørt frá byrjan kann føra til og sipar her til, at Runavíkar kommuna er farin í gongd við at byggja út til oljuhavn fyri 15 mill. kr. Og verður tað givið upp til skutil nú, so verða tað fleiri av slíkum slag.

Vit hava roytn at fáa eina viðmerking frá Tjóðveldisflokkinum. Tað eynaðist ikki, áðrenn deadline.



# Betri at vera pensjónistur

*Á tíðindafundi mánadagin, løgdu Fíggjarmálastýrið og Almanna- og Heilsumálastýrið fram samgonguuppskot um broytingar í skattalógini. Nú skal verða betri at vera pensjónistur og lógin skal gerast einføld at umsita*

Dagfinn Olsen

Tá pensjónistar fáa útgjald næstuferð, vóna Helena Dam á Neystabø og Karsten Hansen, at skattaviðurskiftini eru í lagi, so at bøtast kann um mistakið sum hendi, tá pensjónirnar vórðu hækkaðar við ársbyrjan. Tá hendi tað, at skatturin hækkaði, so pensjónistar sótu eftir við færri pengum í hondini, enn frammanundan.

Á tíðindafundi mánadagin løgdu Fíggjarmálastýrið og Almanna- og heilsumálastýrið fram uppskot, sum er samtykt í samgonguni, um broyting viðvíkjandi skatting av pensjónum.

Uppskotið hevur eftir ætlan við sær, at pensjónistar í framtíðini eru betri fyri peningaliga.

Eftir uppskotinum hjá landsstýrinum fáa tey mest, sum eru støk og fáa lægstu fyritíðarpensjón. Tey fáa umleið 26.000 krónur meira í ár, í mun til í fjør.

Fólkapensjónistur, sum er stakur, fær umleið 12.000 krónur meira í ár, enn í fjør. Fólkapensjónistur, sum er giftur við pensjónisti, fær 8000 krónur meira.

Lægsta vøksturin fáa tey, sum fáa hægstu fyritíðarpensjón. Tey fáa umelið 4.000 krónur meira í ár.

Roknað er útfrá, at kommunu- og kirkjuskattur er 24%.

Karsten Hansen sigur, at soleiðis verður eingin verri fyri, enn hetta.

Hann sigur, at uppskotið er neutralt fyri kommunur og landskassa. Hvørgin teirra vinnur nakað við, at pensjónirnar hækka.



*Á tíðindafundi mánadagin løgdu fíggjarmálastýrið og Almanna- og heilsumálastýrið fram uppskot, sum er samtykt í samgonguni, um broyting viðvíkjandi skatting av pensjónum.*

**Myndir: Jens Kristian Vang**

### Sosialpolitikk ígjøgnum skattalógina

Karsten Hansen metir tó, at tað er óheppi at føra sosialpolitikk ígjøgnum skattalógina.

Men bæði Karsten Hansen og Helena Dam á Neystabø leggja dent á, at talan er um eina bráðfeingisloysn. Tey vísa eisini á, at lógin er einføld at umsita.



*Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, fylgir hugsanarsamur framløguni á tíðindafundinum hjá Fíggjarmálastýrinum og Almanna- og Heilsumálastýrinum*

Broytingar verða ikki gjørdar í nýggju pensjónslógini nú, men arbeiðið at finna útav, hvussu skipanin skal virka framyvir, fer nú ígongd.

Ætlanin var sjálvsagt ongantíð, at nakar skuldi missa nakað við nýggju lógini, men við ætlaðu broytingunum í skattalógini verður bøtt um hetta. Men Karsten Hansen sigur, at til ber ikki at loysa trupulleikan hjá teimum, sum komu illa fyri í januar, tí talan er um tvey ymisk skattaár. Men ætlaðu broytingarnar í skattalógini virka frá 1. januar, og tí verður á tann hátt javnað út.

Uppskotið, sum samgongan er komin við, skal fyrst fyri í Løgtinginum, men Karsten Hansen og Helena Dam á Neystabø vóna, at tingið arbeiðir so mikið skjótt, at broytingarnar virka, tá pensjónistar fáa útgjald næstuferð.

# Freistin úti 12. februar

*Tann 4. mars letur upp í Listaskálanum 11. Várframsýningin, sum Føroysk Myndlistafólk skipa fyri*

Dagfinn Olsen

Tey, ið ætla sær at lata myndir inn til Várframsýningina, mugu nú skunda sær. Tann 12. februar klokkan 18 er freistin úti.

Øll eru vælkomin at lata myndir inn í Listaskálanum, har tilmeldingarbløð eisini eru at fáa. Hesi fáast eisini við at venda sær til Listaskálan á telefon 313579.

Myndirnar, ið verða latnar inn, skulu vera klárar at heingja upp, og mugu ikki vera í clipsrammu.

Várframsýningin er fyriskipað av felagnum Føroysk Myndlistafólk, ið er felagið hjá yrkismyndlistafólkum.

Í nevndini sita Astri Luihn, forkvinna, Olivur við Neyst, kassameistari og Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, skrivari.

Sýningin í ár er hin 11. í røðini og hon er hvørt ár fyrsta leygardag í mars.

Ætlanin við Várframsýningini er at vísa, hvat yrkislistafólk fáast við og hvat nýtt hendir innan myndlistina. Men øll eru vælkomin at senda verk inn. Ætlanin er eisini, at sýningin skal vera kveikjandi. Tá ein hevur havt verk við á sýningini 3 ferðir, gerst ein limur í Føroysk Myndlistafólk.

Astri Luihn sigur, at talan er um sensureraða sýning. Tó eigur eingin at verða skuffaður, um viðkomandi ikki fær verk við.

– Hetta hava øll roynt, eisini tey, sum í dag eru yrkislistafólk, sigur Astri Luihn, sum metir, at slíkt eigur ein at tola.



*Astri Luihn, forkvinna í Føroysk Myndlistafólk*

### Metingarnevnd

Tað verða 3 fólk vald í eina metingarnevnd. Henda nevnd metir um innkomnu verkini. Tey royna so at skapa eina sýning, sum er umboðandi, vísir hvat hendir og tey royna at skapa sýning, sum eisini er ein heild.

Fólkini sita 3 ár í nevndini. Í ár sita Guðrið Poulsen, á 3. ári, Tita Vinther, á 2. ári og Tróndur Patursson hevur verið við í eitt ár.

Metingarnevndin arbeiðir hvønn dag út í eitt í 3 vikur við at seta saman Várframsýningina.

Funnist hevur onkutíð verið at felagnum Føroysk Myndlistafólk, tí tey skipa ikki fyri fleiri sensureraðum sýningum. Men Astri Luihn sigur, at tey hava hvørki orku ella ráð at skipa fyri fleiri sýningum árliga.

Várframsýningin 2000 letur upp 4. mars í Listaskálanum

# Í útlond at leika

*Shalder Geo er á tónleikaferð í Føroyum. Hetta er byrjanin til ferð í grannalondunum í vár*

Dagfinn Olsen

Saman við Eivør Pállsdóttir Kvartett, ferðast bólkurin Shalder Geo í hesum døgum í Føroyum. Tann 4. februar spæla bólkarnir í Café Natúr og kvøldið eftir í Klaksvík í Atlantis..

Shalder Geo skal tó víðari á ferðini. Í apríl byrja teir eina ferð í grannalondunum, ið heldur fram til juli mánað. Bólkurin vitjar í Finnlandi, Danmark, Estlandi og Sámalandi.

Shalder Geo greiðir soleiðis frá navninum: navnið er úr Hetlandi. Geo úttalast gjó = Tjaldursgjógv.

Bólkurin fann saman til eina innspæling við sama navnið í 1997. Klaverleikarin Kristian Blak stovnaði bólkin og hinir limirnir eru Heðin Ziska Davidsen, Mikael Blak og Høgni Klakkstein.

Umframt verða ymsir gestatónleikarar, ið vitja á ferðini.

Bólkurin spælir improvisatiónstónleik yvir egið tónasmíð og fólkatónleik. Á innspældu fløguni er støði tikið í løgum úr Føroyum og Hetlandi.

Umframt henda tónleik, er annað etniskt tilfar, sum Kristian Blak eigur meginpartin av. Tilfar, hann hevur innspælt og smíðað løg yvir síðani sjeyti árini. Men eisin nýggjari tilfar er á skránni.



*Høgni Klakkstein, Mikael Blak, Kristian Blak og Heðin Z. Davidsen mynda Shalder Geo*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

Inuit-tónleikur úr Addeq suituni, føroysk Kingoløg, úr Snjóugluni og tónleikur úr Klæmintsgjógv. T.d. er eisini tilfar hjá Heðini úr útgávuni í Eb-inum og møguleikar verða at víðka skránna við eitt sindur av joiki.

20 konsertir eru á skránni komandi hálva árið. Umframt at spæla á ymsum spælistøðum og í føroyskt - finska felagnum Tjaldur í Helsinki, so verður eisini luttøka á Jazzkaar í Estlandi, páskastevnu í Kautokeino. Umframt eru á skránni Summartónar og Fólkatónleikarastevna í Føroyum.

Ferðin hjá Shalder Geo er komin í lag í samstarvi við Jazzkaar, har Norðurlandahúsinum er við í leikinum, og seinni er samstarv komið í lag við m.a. Universitetið í Joensuu, finsk Karelia, Pauli Hallman, Kuopio, Tjaldur, sámiska forlagið Dat, sum Tutl samstarvar við.

Ferðin er ein av mongum, sum Tutl fyrireikar við tónleikarum, sum hava givið út hjá felagnum og er hetta liður í marknaðarføring uttanlanda. Komandi árini standa konsertir á skránni hjá Tutl í Íslandi, USA, Ísrael og Fraklandi.

Skráin hjá Shalder Geo er henda: 19/4, Keypmannahavn. 21-22/4, Alfreds Kro, Kautokeino. 24/4, Tornio. 25/4, Jyväskylä. 26/4, Helsinki. 27/4, Kuopio. 28/4, Joensuu. 29-30/4, Tallin. 1/5, Suðurfinnland.

Eftir hetta eru konsertir í Føroyum.